## Unn og Tróndur um politikk

Unn: - Eg fylgi nokkso væl við. Tað er strævið at fylgja við, tí eg kann einki gera við tað, sum eg eri ósamd í. Eg vil lýsa meg sjálva sum grøn/liberala
Tróndur: - Eg haldi eisini, at eg fylgi nokkso væl við her heima. Eg vil siga, at eg eri tjóðveldismaður

## Unn og Tróndur um trúgv



Unn: - Eg tími væl at trúgva uppá Gud, men eg havi ógvuliga ilt við tað við mínari fornuft
Tróndur: - Eg trúgvi uppá okkurt, men eg veit ikki hvat. Eg vil kalla meg sjálvan ein humanist. Eg livi eftir nógvum av teimum kristnu virðunum

# Foreldrini ivaðust teðga



*Unn og Tróndur Kragesteen eru tøtt systkin. Tey spæla bæði við Neistanum, og hava altíð havt eitt tætt samband*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nú er støðan eitt sindur broytt, tí at Tróndur býr hjá verfamiljuni, meðan Unn enn býr heima.

- Tað kennist eitt sindur løgið, at Tróndur er fluttur út nú. Vit eru komin í tann aldurin, har ið vit fara at hugsa um at fara at lesa uttanlands, og tú hugsar ikki um tað, fyrr enn tú knappliga stendur í støðuni, har ið vit skulu skiljast. Tað er saknur í Trónda. Hann er tó so forelskaður, at hann leggur ikki merki til tað, sigur Unn við einum smíli.

### Fer langt burtur at lesa

Tey hava bæði ætlanir um at fara uttanlands at lesa. Tróndur hevur tó torført við at sleppa Neistanum.

- Eg havi sett mær fyri, at eg fari ikki uttanlands, fyrr enn eg havi vunnið føroyameistaraheitið við Neistanum, sigur Tróndur, sum er klárur til at bíða inntil hann verður yvir 30, um tað verður neyðugt.

Hann ætlar sær tó uttanlands at lesa, men hann veit ikki hvat, hann skal lesa. Hann ætlar sær at taka í hvørt fall eitt ár frí frá skúlanum, nú hann verður studentur í summar.

Unn hevur ætlanir um at fara at lesa um ikki alt ov leingi, og hann ætlar sær longur enn bert til Danmarkar.

- Eg arbeiði sum lærari nú, men eg havi allatíðina verið vís í, at eg ikki fari at gerast lærari. Eg tími tó væl at arbeiða við fólki, so eg ætli mær at lesa okkurt humanistiskt fak. Møguliga fari eg at lesa retorikk.

- Eg ætli mær at lesa í einum enskt-talandi landi. Helst so langt burtur sum gjørligt. Eg fari at fjakka til New Zealand í summar og so ætli eg eisini at kanna møguleikarnar fyri at lesa har, sigur Unn.

### Droymir ikki um hondbólt uttanlands

Tróndur er longu, hóast sín unga aldur, fastur á landsliðnum, og hann er ein av teimum bestu ungu leikarunum í landinum. Hann hevur tó ikki ítøkiligar ætlanir um at royna hondbólts-eydnuna uttanlands.

- Tað ljóðar kanska dapurskygt, men eg havi torført at ímynda mær, at eg spæli á einum hægri støði við mínari støðd. Eg eri einans umleið 1,77 metrar høgur, og tað er í so lítið. So eg veit ikki, hvat eg hevði gjørt, um eg fekk møguleikan. Eg tori kanska ikki ordiliga at satsa uppá tað. Eg eri vorðin ov heimkærur, sigur Tróndur við einum smíli.

- Eg ætli mær tó niður at lesa eina ferð, og tá fari eg at royna at spæla hondbólt har, sigur hann.

### Kvinnur við skerdan lut

Unn er somuleiðis ein av bestu ungu hondbóltsleikarum í føroyskum kvinnuhondbólti. Hon ásannar tó, at ítróttarmenn hava størri møguleikar enn ítróttarkvinnur.

- Tað er torført at síggja í eyguni, at menn hava størri møguleikar innan ítrótt. Tað verður útvarpað frá mansdystum og ikki kvinnudystum, og sum heild er áhugin bara størri fyri mannfólki. Í Danmark er tað umvent. Har er kvinnuhondbóltur størri enn manshondbóltur, staðfestir Unn.

Tey bæði ítróttarsystkini eru sera tætt knýtt, og tey standa nú yvirfyri nýggjum avbjóðingum. Spennandi verður at fylgja teimum við Neistanum næsta ár, tí at bæði Unn og Tróndur fara eftir at vinna sítt fyrsta føroyameistaraheiti í bestu deildini.

## Fakta

**Tróndur Kragesteen**
Føddur 02.08.1987
Gongur í 3. s í Hoydølum
Forlovaður

**Unn Kragesteen**
Fødd 13.01.1986
Er læraravikar í Nólsoy
Forlovað